# Tilmæli til landsstýriskvinnuna í heilsumálum um ávísingar- og útgreiningarskipan fyri krabbamein

## Latið leiðsluni í Sjúkrahúsverkinum

30. november 2023

[Mailadresse]

# Innihaldsyvirlit

Høvuðsniðurstøður, tíðarætlan og fíggjarligar avleiðingar........ 2
Inngangur ........ 4
Lógarverkið í Danmark........ 7
Eiga at set hámark fyri bíðitíðir í lóg........ 10
Serstakar pakkagongdir fyri krabbameinssjúkur........ 11
Ávísingar savnast á einum stað, forløbskoordinator og útgreiningareind........ 12
Onnur serøki mugu eisini fáa eitt lyft........ 15



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

## Høvuðsniðurstøður, tíðarætlan og fíggjarligar avleiðingar

- Arbeiðsbólkurin staðfestir, at vit eru eftirbátur, tá ið tað kemur til at tryggja føroyska sjúklinginum skjóta útgreining og viðgerð fyri krabbamein. Hagtøl benda eisini á, at vit ikki eru á støði við okkara grannalond
- Arbeiðsbólkurin mælir tí til:
- at politiska skipanin ger lógarásettar reglur um hámørk fyri bíðitíðir til útgreining og viðgerð fyri krabbamein. Arbeiðsbólkurin vil tó gera greitt, at tað er alt avgerandi, at neyðuga fyrireikingin verður gjørd áðrenn hesar reglur koma í gildi, samstundis sum týðandi uppraðfestingar verða gjørdar á fleiri serøkjum. Lógarverkið og fíggingin má ganga hond í hond.
- at bíðitíðirnar eru so nær við tær donsku sum gjørligt, tí føroyskir krabbasjúklingar í mesta mun fáa viðgerð í Danmark
- at føroyska heilsuverkið í mesta mun fylgir teimum pakkum, ið eru orðaðir og tøkir hjá donsku Sundhedsstyrelsen. Í teimum førum, tað er neyðugt, eigur pakkin at verða tillagað føroysk viðurskifti.
- at nýggj móttøkueind verður gjørd í Cosmic, ið verður kallað "Krabbaútgreiningareindin". Allar nýggjar ávísingar, ið fevna um krabbamein á ein ella annan hátt, skulu verða sendar til Krabbaútgreiningareindina. Tá Krabbaútgreiningareindin verður vald sum móttøkueind, skal vera møguligt at velja eina av defineraðu pakkagongdunum.
- at sjúkrarøktarfrøðingar við neyðugu førleikunum umsita og samskipa allar ávísingar, sum koma til Krabbaútgreiningareindina hvønn gerandisdag. Mælt verður til, at tríggir sjúkrarøktarfrøðingar fáa upplæring sum samskiparar.
- at skipa verður ein diagnostisk eind á Landssjúkrahúsinum, ið skal virka allar gerandisdagar. Ein diagnostisk eind skal lofta teimum, ið ikki passa í eina pakkagongd, tí sjúkutekini eru ikki heilt greið – men illgruni er um krabbamein. Eindin skal eisini at umsita Krabbaútgreiningareindina
- at fleiri serøkir fáa eitt lyft. Í hesum tilmælinum er serligt fokus á tey økir, sum veita tænastur, sum eru avgerandi í útgreiningini av krabbameini, t.d. patologi, endoskopi, røntgen.
- at útgreining við illgruna um krabbamein sum høvuðsregla verður framd á Landssjúkrahúsinum.
- at fleiri kontrol-skopiir kunnu liggja á SS og KS, so kapasiteturin verður gagnnýttur í øllum Sjúkrahúsverkinum.



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

## 2024

- Heilsumálaráðið smíðar rammulóg, sum gevur heilmild at áseta hámørk fyri bíðitíðir til útgreining og viðgerð fyri krabbamein í Føroyum við gildiskomu í 2025
- Settur verður arbeiðsbólkur at gera sonevndar krabbapakkar í tøttum samstarvi við serøkini og "action card" til ávísandi læknar at brúka.
- Gjørd verður ein nýggj móttøkueind í Talgildu heilsuskipanini, ið verður kallað Krabbaútgreiningareindin. Allar nýggjar ávísingar, ið fevna um krabbamein á ein ella annan hátt, skulu sendast Kabbaútgreiningareindin frá 1. september 2024. Skipanin verður royndarkoyrd frá apríl til august.
- Diagnostisk eind verður skipað á Landssjúkrahúsinum at lofta teimum, ið ikki passa í eina pakkagongd. Eindin hevur eisini um hendi nýggju Krabbaútgreiningareindina. Sjúkrarøktarfrøðingar við samskiparaførleikum verða settir. ***1,8 mió. kr.***
- Uppraðfesta patologiina við at seta og upplæra bioanalýtikarar burturav til patologiina á Landssjúkrahúsinum. ***1,1 mió. kr.***
- Uppraðfesta endoskopiina. Sjúkrarøktrarfrøðingahópurin í endoskopiini á Landssjúkrahúsinum verður øktur við einum ella tveimum og tveir sjúkrarøktarfrøðingar skulu upplærast at gera skopiir. Ein skrivari verður settur, so samlaðu førleikarnir kunnu gagnnýtast betur. ***1,4 mió. kr.***
- Tað er greitt, at skulu vit liva upp til áleið somu hámørkini fyri bíðitíðir sum í okkara grannalondum, mugu eisini onnur serøki raðfestast, bæði við manning, útbúgving og útgerð. Arbeiðsbólkurin ger eina greining av tørvinum innan viðkomandi serøkini á bæði diagnostiska- og viðgerðarøkinum

## 2025

- Ein patologur verður settur aftrat tí verandi. ***1,25 mió. kr.***
- Neyðug tól verða keypt til patologiina. Tørvur er á einari genmutationstóli til tarmkrabba - Idylla - umframt glasprentara. Nýtt skáp við kamera at skera í. ***1,5 mió. kr.***
- Ein fastur yvirlækni verður settur í endoskopieindini aftrat verandi manning. ***1,25 mió. kr.***
- Neyðugt er at endoskopieindina fær betur karmar at virka undir fyri at tryggja, at sjúklingar ávístir við illgruna um krabbamein verða kannaðir skjótast til ber. Í hesum er eisini at fáa til vega høli til viðrakning, tíðarhóskandi vaskiútgerð, umframt eina skopistovu aftrat. ***10 mió. kr***.

## 2026 - 2030

- Serøkini verða raðfest sambært greiningini, sum verður gjørd í 2024. ***Óvist er hvussu stórur fíggjarligi tørvurin verður, men talan er um týðandi upphæddir.***



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

# Inngangur

Nýggj Krabbameinsætlan fyri Føroyar varð handað landsstýrismanninum í heilsumálum á vári 2022. Aðalmálið við ætlanini er, at størri áherðsla á fyribyrging skal minka um títtleikan av krabbasjúkum, og at betri viðgerðartilboð skulu tryggja, at fleiri blíva frísk ella kunnu liva leingi við sjúkuni.

Talið av krabbameinstilburðum hevur verið vaksandi seinnu árini. Í Krabbameinsætlanini fyri Føroyar verður sipað til gransking sum vísur, at talið av staðfestum krabbatilburðum er vaksið frá sløkum 200 í 2007 til upp móti 250 tilburðum í 2019. Talið av teimum, ið doyggja, hevur tíbetur ikki hevur fylgt við, men hevur flestu árini ligið rættiliga støðugt um 100 árliga. Samstundis hevur gongdin verið tann, at tað eru munandi fleiri, ið nú liva fimm ár eftir, at sjúkan varð staðfest. Føroyar eru tó framvegis ein eftirbátur samanborið við onnur Norðurlond, tí tað eru uppaftur fleiri í okkara grannalondum, ið eru á lívi fimm ár eftir, at sjúkan varð staðfest.

Í Krabbameinsætlanini fyri Føroyar eru 69 tilmæli, sum fevna um m.a. herd átøk ímóti royking, screening fyri tarmkrabba og víðkað tilboð um screening fyri lívmóðurhálskrabba, endurmenning av krabbameinssjúklingum, einfaldari ávísingarskipan, endurnýggjan av viðgerðartólum, raðfesting av palliasjón og nógv annað.

Somuleiðis var mælt til at seta eitt Krabbameinsráð, sum skal ráðgeva, hvussu og í hvørjari raðfylgju tilmælini í Krabbameinsætlanini skulu setast í verk. Krabbameinsráðið hevur latið landsstýriskvinnuni sítt fyrsta tilmæli og í hesum verður mælt til at raðfesta fýra tiltøk í 2023. Eitt av hesum tilmælum er at seta í verk eina nýggja ávísingar- og útgreiningarskipan (við útgreiningareind) og hevur landsstýriskvinnan í hesum sambandi biðið Sjúkrahúsverkið seta ein arbeiðsbólk. Arbeiðssetningurin hjá bólkinum var soljóðandi:

***Sjúkrahúsverkið er biðið um at seta ein arbeiðsbólk at gera eitt tilmæli um, hvussu ein nýggj ávísingar- og útgreiningarskipan – í samsvari við krabbameinsætlanina – kann verða sett í verk í Sjúkrahúsverkinum. Tilmælið er, at arbeiðið verður gjørt í samráð við kommunulæknaskipanina. Í tilmælinum eigur at verða gjørd ein tíðarætlan og kostnaðarætlan av at seta eina nýggja ávísingar- og útgreiningarskipan í verk***

Í arbeiðsbólkinum hava sitið hesi umboð:


LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

- Gunnvá Guttesen, varastjóri
- Rudi Kollslíð, depilsleiðari
- Jan Rasmussen, yvirlækni í kardiologi
- Tordis Kristiansdóttir, yvirlækni í onkologi
- Rói á Kósini, kommunulækni
- Jansy Gaardlykke, Krabbameinsfelagið
- Fróði Jacobsen, stjórnarfulltrúi og skrivari í bólkinum

Arbeiðsbólkurin hevur í serliga havt sjóneykuna á hvussu vit kunnu stytta um og gera útgreiningina betri í Føroyum. Talan er um tíðarskeiði frá tí, at lækni fær illgruna um krabba til sjúklingurin er útgreinaður og staðfest verður, um talan var um krabbamein ella ikki. Ein partur av arbeiðssetninginum hjá arbeiðsbólkinum hevur verið at lýsa verandi støðu og í hesum sambandi skipaði bólkurin fyri einari samrøðurundferð við viðkomandi serlæknar, sum arbeiða á økinum, bæði kommunulæknar og sjúkrahúslæknar. Eisini hevur bólkurin tosað við Røntgendeildina á Landssjúkrahúsinum og umboð fyri talgildu heilsuskipanina. Endamálið við samrøðunum var, umframt at fáa lýst fyrimunir og vansar við verandi mannagongdir, at fáa inputt til hvussu skipanin eigur at vera frameftir. Hesir serlæknar koma saman við øðrum eisini at vera lyklapersónar, um, og tá, arbeiðast skal víðari við tí, ið arbeiðsbólkurin mælir til í hesum tilmæli.

Arbeiðsbólkurin hevur eisini kunna seg um hvussu ávísingar- og útgreiningarskipanin er í Danmark. Sjúkrahúsverkið samstarvar við donsk sjúkrahús á stórt sæð øllum økjum og heilsulóggávan í Føroyum er í ávísan mun danskt málsøki. Bólkurin hevur í sambandi við arbeiðið vitja Sundhedsstyrelsen, diagnostisku eind á Herlev Hospital og skurðdepilin á Bispebjerg Hospital.

Danir fóru undir at gera krabbameinsætlanir um aldarskiftið, tí hagtøl vístu, at sannlíkindini at liva fimm ár eftir, at tú hevði fingið staðfest krabbamein, var væl lægri enn í øðrum Norðurlondum. Nú tey eru tey farin undir at gera ta fimtu krabbameinsætlanina, er Danmark komið á hædd við grannalondini.

Myndilin niðanfyri vísir gongdina í Danmark síðani 2006. Sum dømi kann nevnast, at sannlíkindini hjá monnum at vera á lívi fimm ár eftir, at krabbameinssjúka er staðfest, er øktur úr 45 prosentum upp í stívliga 60 prosent (tá er prostatakrabbi ikki við). Orsøkin er einføld. Politiska skipanin hevur

raðfest krabbameinsøkið og støðugt sett stórar upphæddir av fyri at røkka málunum í teimum higartil fýra krabbameinsætlanunum, sum lagdar eru fram.

Figur 2 5-års aldersstandardiseret relativ overlevelse efter kræft (eksklusiv anden hudkræft end modermærkekræft), samlet og for mænd (eksklusiv prostatakræft) og kvinder (eksklusiv brystkræft), 2006-2008 til 2018-2020




Kilde: Cancerregisteret pr. 18. november 2021, Sundhedsdatastyrelsen.
Det Centrale Personregister (CPR) pr. 31. december 2021, Sundhedsdatastyrelsen.

Note: 3-års perioderne refererer til årene for diagnose. Aldersstandardisering er foretaget med International Cancer Survival Standard (ICSS)

Tær fyrstu tvær ætlanirnar høvdu fokus á at økja kapasitetin og viðgerðartilboðini, umframt at skipa og at samskipa sjúklingagongdirnar betri. Í 2005 vórðu eisini tey fyrstu “pakkaforløbini” gjørd. Vit kunnu tí siga, at danir hava útvið 20 ára royndum við at gera skipaðar tilgongdir innanfyri bæði útgreining og viðgerðir, so ongar óneyðugar bíðitíðir standast. Seinnu árini hava verið brúkt til at optimera hesar tilgongdir, samstundis sum tær eru gjørdar einfaldari og léttari at brúka.



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

## Lógarverkið í Danmark

Somuleiðis er í Danmark eisini lógarásett, hvussu leingi tú sum sjúklingar í mesta lagi skal bíða eftir útgreining og eftir viðgerð. Lat okkum stutt greiða frá høvuðspunktunum í lóggávuni á økinum. Umframt umsetta lógartekstin hava vit eisini sett inn eina mynd, sum illustrerar sjúklingagongdina í mun til evstu bíðitíðir.

Sambært kunngerð 584 frá 28. apríl 2015 við heimild í §88, stk. 6 og §89, stk. 5 í Sundhedsloven er ásett:

Kapitul 1:

§1. Kunngerðin viðger hámark fyri bíðitíð til viðgerð av sjúklingum við krabba.

Stk. 2. Krabbi, ið krevur mergtransplantatión og húðkrabbi, sum ikki er móðurmerkjakrabbi, eru ikki umfataðir av kunngerðini.

Stk. 4. Hugtakið "viðgerð av krabba" fevnir um útgreining, viðgerð og eftirviðgerð.

Kapitul 2:

§2. Um fyrilitið fyri heilsustøðuni hjá sjúklinginum ikki er ein forðing, eru galdandi hesi hámørk fyri bíðitíð:

1) Til útgreining fyri krabba: 14 kalendaradagar frá tí degi, at sjúkrahúsið hevur móttikið ávísing til forkanning, til tann dag, at sjúkrahúsið bjóðar at byrja útgreining.
2) Til skurðviðgerð eftir lokna útgreining: 14 kalendaradagar frá tí degi, at sjúklingurin hevur fingið kunning og givið samtykki til eina ávísa skurðviðgerð, til at skurðviðgerðin kann fremjast. Og í mesta lagi 28 kalendaradagar eftir at ávísing til viðgerð er móttikin á sjúkrahúsinum.
3) Til medisinska viðgerð sum fyrsta viðgerð: 14 kalendaradagar frá tí degi, at sjúklingurin hevur fingið kunning og givið samtykki til eina ávísa medisinska krabbaviðgerð, til at medisinska viðgerðin kann byrja. Og í mesta lagi 28 kalendaradagar frá at ávísing til viðgerð er móttikin á sjúkrahúsinum.
4) Til stráluviðgerð sum fyrsta viðgerð: 14 kalendaradagar frá tí degi, at sjúklingurin hevur fingið kunning og givið samtykki til eina ávísa stráluviðgerð, til at stráluviðgerðin kann byrja. Og í mesta lagi 28 kalendaradagar frá at ávísing til stráluviðgerð er móttikin á sjúkrahúsinum.



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

5) Til medisinska viðgerð ella stráluviðgerð eftir lokna fyrstu viðgerð: 14 kalendaradagar frá tí degi, at sjúklingurin hevur fingið kunning og givið samtykki til eina ávísa medisinska- ella strálu-eftirviðgerð til at eftirviðgerðin kann byrja. Og í mesta lagi 28 kalendaradagar frá at ávísing til eftirviðgerð er móttikin á sjúkrahúsinum.

§4. Tíðarfreistirnar ásettar í §2 og §3 verða roknaðar frá og við degnum eftir, at sjúkrahúsið hevur móttikið ávísingina, ella at sjúklingurin hevur givið kunnað samtykki. Fyrstu ferð sjúklingurin møtir á deildini, er at rokna sum fyrsti dagur í útgreiningartilgongdini.



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo




Kapitul 3 viðger ábyrgdina hjá regiónunum at tryggja, at allir sjúklingar fáa tilboð innan ásettu hámørk fyri bíðitíð.



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

§7. stk.2: Í seinasta lagi 11 kalendaradagar eftir, at sjúkrahúsið hevur móttikið eina ávísing um at kalla sjúkling til útgreining sambært §1, skal sjúkrahúsið boða sjúklinginum frá, um viðkomandi kann verða boðin viðgerð innan ásetta hámarkið fyri bíðitíð á sjúkrahúsi í bústaðarregiónini ella á sjúkrahúsi, sum regiónin hevur gjørt avtalu við. Um til ber at bjóða viðgerð innan ásetta hámark fyri bíðitíð, skal sjúklingurin verða boðin ein dag at møta.

§8. Er bústaðarregiónin ikki før fyri at bjóða viðgerð á egnum sjúkrahúsi innan ásetta hámarkið fyri bíðitíð, skal regiónin við samtykki frá sjúklinginum bjóða sjúklinginum viðgerð á øðrum sjúkrahúsi í Danmark ella uttanlands, ið kann bjóða viðgerð innan ásetta hámark fyri bíðitíð.

§10. Megnar bústaðarregiónin ella onnur región, ið avtala er gjørd við, ikki at fáa til vega eitt viðgerðartilboð innanlands ella uttanlands innan ásetta hámark fyri bíðitíð, skal tað verða boðað til Sundhedsstyrelsen beinanvegin, um sjúklingurin ynskir tað.

## Eiga at set hámark fyri bíðitíðir í lóg

Í dag er eingin áseting í føroyska heilsuverkinum, hvussu skjótt sjúklingar skulu fáa tilboð um útgreining og viðgerð fyri krabba. Ei heldur er nøkur neyv skráseting av, hvussu skjótt sjúklingar koma til bæði útgreining og viðgerð av krabba í Føroyum. Danska heilsuverkið veitir føroyingum í mesta mun eina tænastu, ið er innan karmarnar av ásettu hámørkum fyri bíðitíð í Danmark. Meðan viðurskiftini í Føroyum als ikki eru skipaði hvørki í lóg ella praksis – og tískil livir føroyska heilsuverkið ikki upp til tey krøv, ið okkara donsku samstarvsfelagar hava.

***Mælt verður til, at ein rammulóg verður smíðað beinanvegin við støði í Sundhedsloven í Danmark, har ásett verður í kunngerð, hvørjar bíðitíðir skulu vera galdandi í Føroyum til útgreining og viðgerð av krabbameini. Mælt verður til, at bíðitíðirnar eru so nær við tær donsku sum gjørligt, tí føroyskir krabbasjúklingar í mesta mun fáa viðgerð í Danmark.***

Avgerandi verður, at tær ásetingar, ið koma, líkjast so nógv teimum donsku sum gjørligt – ella eru enn betur, um tað er gjørligt.

Tað er týdningarmikið, at ein eftirlitsmyndugleiki verður, ið kannar hagtølini t.d. árliga at tryggja, at føroyska heilsuverkið heldur ásettu bíðitíðirnar innan ymisku krabbasjúkurnar. Harafturat skal gerast ein árlig frágreiðing grundað á hagtølini, hvussu bíðitíðirnar hava verið seinasta árið í ymisku pakkunum.



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

Harafturat eigur at verða orðað ein leistur, so til ber at hava regluligt eftirlit frá myndugleikunum, um lógin um bíðitíðir verður hildin í føroyska heilsuverkinum.

## Serstakar pakkagongdir fyri krabbameinssjúkur

Fyri at tryggja eina so smidliga, skipaða og skjóta útgreining og viðgerð fyri krabbamein sum gjørligt í Danmark, valdi Sundhedsstyrelsen at orða serligar pakkar fyri flestu sløg av krabbameini. Hetta varð gjørt í neyvum samstarvi við umboð fyri viðkomandi læknalig serøki. Hesir pakkar verða kallaðir "pakkeforløb for kræft". Orðaðir eru í dag 26 ymiskir pakkar, ið fevna um umleið 40 sløg av krabbameini. Pakkarnir eru allir tøkir á heimasíðuni hjá Sundhedsstyrelsen, sst.dk.

Ein krabbameinspakki lýsir vanligu sjúkutekini og gevur eitt yvirlit yvir kanningar, viðgerðir og gongdini frá illgruna, útgreining, viðgerð og eftirviðgerð. Í pakkanum er eisini viðmælt, hvussu long útgreiningar- og viðgerðartilgongdin skal vera í mesta lagi, sum deildir og sjúkrahús kunnu nýta at skipa sítt virksemi. Viðmældu tíðirnar at avgreiða útgreining- og viðgerð endurspegla, hvussu leingi serøkini meta ein útgreiningartilgongd tekur at fremja – tískil kunnu tíðarásetingarnar vera ymiskar frá pakka til pakka. Tó altíð innanfyri ásettu hámørk fyri bíðitíð.

Allir pakkar hava eitt "pakkeforløb", ið er stóra skrivið, har flestu viðurskifti viðkomandi fyri ávísa krabbaslagið eru lýst. Og harafturat er eitt "indgangsdokument", ið er at fata sum eitt "actionkort", ið á einari blaðsíðu lýsir, hvussu farast skal fram, tá illgruni er um ávísa krabbasjúku og ávísast skal til ein pakka. Skjalið er serliga ætlað primer sektorinum, tvs. kommunulæknum.

***Mælt verður til, at føroyska heilsuverkið í mesta mun fylgir teimum pakkum, ið eru orðaðir og tøkir hjá donsku Sundhedsstyrelsen. Í teimum førum, tað er neyðugt, eigur pakkin ella "indgangsdokumentið" verða tillagað føroysk viðurskifti.***

***Mælt verður til, at settur verður ein arbeiðsbólkur at gjøgnumganga allar pakkarnar til tess at tryggja, at serlig føroysk viðurskifti verða tikin til eftirtektar – hetta í neyvum samstarvi við serøkini í føroyska heilsuverkinum og kommunulæknaskipanina.***

***Eisini verður tilmælt, at tað í framtíðini verður ein læknaligur ábyrgdari í føroyska heilsuverkinum, ið tryggjar, at innihaldið í serliga teimum tillagaðu skjølunum er dagført og viðkomandi.***


LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

Danska heilsuverkið hevur nú 20 ára royndir við orðaðum pakkagongdum til øll hugsandi sløg av krabbameini. Upprunaarbeiðið at orða pakkarnar innan øll viðkomandi serøki var eitt ódnartak. Men síðani eru pakkarnir eisini áhaldandi dagførdir og skornir til, so teir eru so viðkomandi og nýtsluvinarligir sum gjørligt. Harafturat er arbeiðið at orða "indgangsdokumentið" gjørt í neyvum samstarvi við primer sektorin í Danmark, so hetta skjalið eisini er so viðkomandi og arbeiðsvinarligt sum til ber. Kunning til sjúklingar og orðaðar leiðreglur um endurvenjing v.m. er so líðandi komið aftrat.

Mett verður, at tað er skilabest at nýta donsku pakkarnar sum útgangsstøði, men eru serlig føroysk viðurskifti, ið krevja tillagingar, so kann tað orðast sum eitt eyka skjal, ið er tøkt t.d. á heimasíðuni hjá Heilsumálaráðnum. Tað arbeiðið má gerast í einum bólki, ið hevur tætt samstarv og samskifti við ymisku serøkini innan føroyska heilsuverkið.

Arbeiðið, at orða heilt nýggjar pakkar til føroyska heilsuverkið, verður ov rúgvismikið – eisini verður tað ov stórt arbeiði at áhaldandi dagføra innihaldið. "Indgangsdokumentið", ið bert er ein síða, kann væl verða tillagað føroysk viðurskifti. Men avgerandi er, at atgongdin til tað skjalið er løtt og ómakaleys hjá kommunulæknunum á t.d. heimasíðuni hjá Heilsumálaráðnum.

Viðurskiftini kring pakkar og viðkomandi skjøl eiga at hava tryggar karmar – tað kann vera innan Sjúkrahúsverkið ella í Fólkaheilsustýrinum, sum frammanundan arbeiðir við einum føroyskari sjúklingaskrá. Tryggjast skal, at tilfarið altíð er dagført og viðkomandi, og at atgongdin og nýtslan av tilfarinum er optimal.

## Ávísingar savnast á einum stað, forløbskoordinator og útgreiningareind

Í Danmark verða ávísingar frá primer sektorinum (t.e. kommunulæknaskipanini) móttiknar í Central Visitationen (CVI) og síðani sendar víðari til viðkomandi serøki og stað. Tað er av alstórum týdningi, at tíðspunktið fyri móttøku verður skrásett, so til ber at hava neyvt eftirlit við, um ásettu tíðarkrøvini verða hildin. Í journalini hjá sjúklingunum verður neyvt skrásett nær ávísing er móttikin, nær sjúklingurin hevur fingið boð, kemur til kanningar, fær úrslitið at vita, fær tilboð um viðgerð og nær viðgerðin verður framd v.m. Hetta verður gjørt við serstøkum kotum.

Á rannsóknarferðini hjá arbeiðsbólkinum í Keypmannahavn kom fram, at tað er heilt sentralt, at vit í Føroyum gera eina góða skipan at tryggja eina neyva monitorering av gongdunum. Á tann hátt ber til



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

at síggja nær og hvar trupulleikar eru, ið elva til, at sjúkugongdirnar ikki eru nøktandi. Harafturat er neyðug skjalfesting tøk, tá eftirlit verður framt, um lógin verður hildin.

Í Føroyum verður talgilda heilsuskipanin (THS) nevnd Cosmic nýtt í øllum geirum innan heilsuverkið. Sostatt verða allar ávísingar sendar inni í Cosmic skipanini bæði frá kommunulæknaskipanini til sjúkrahúsverkið og innanhýsis í sjúkrahúsverkinum. Í dag ávísa kommunulæknar beinleiðis til serøkini ella eindir innan sjúkrahúsverkið (t.d. endoskopi-eindina á Landssjúkrahúsinum), um illgruni er um krabbamein. Tá er tað kommunulæknin, sum skal tryggja, at ávísingin endar á rætta stað – og at ávísingin er orðað soleiðis, at illgruni um krabba er sjónligur. Ávísingin fer so at siga í "stóra pott" – eins og allar aðrar ávísingar um stórt og smátt.

***Mælt verður til, at THS ger eina nýggja móttøkueind í Cosmic, ið verður kallað "Krabbaútgreiningareindin". Allar nýggjar ávísingar, ið fevna um krabbamein á ein ella annan hátt, skulu verða sendar til Krabbamóttøkuna. Tá Krabba***útgreiningareindin ***verður vald sum móttøkueind, skal vera møguligt at velja ein av pakkagongdunum, ið vit kenna frá donsku skipanini, tillagað føroysk viðurskifti.***

***Ein lítil arbeiðsbólkur við umboðum frá THS og hesum arbeiðsbólkinum skulu orða neyvt ein arbeiðssetning at gera eina nýggja krabbamóttøku í Cosmic – t.e. innihald og tekniskar loysnir.***

Tað er ein greiður veikleiki innan føroyska heilsuverkið í dag, at tað ikki er ein móttøka fyri ávísingar við illgruna um krabbamein. Vandi er fyri, at ávísingar enda á skeiva tað, ella verða "burtur" í mongdini, tí krabbaávísingarnar fara sama stað, sum allar aðrar ávísingar til serøkini ella eindirnar í Heilsuverkinum. Harafturat er ein vandi, at serøkini ella eindirnar ikki hava eina regluliga visitatión árið runt, orsakað av feriutíð, sjúku ella øðrum. Tað kann merkja, at ávísingar um krabba ikki verða visiteraðar nóg væl allar tíðir á árinum við verandi leisti. Harafturat er tað ein avbjóðing at hava neyva skráseting av krabbameinsávísingum við verandi leisti, tí ávísingarnar ikki koma inn á sama stað.

Arbeiðsbólkurin hevur verið á fundi við umboð fyri THS, og varð staðfest, at tað ber væl til at gera eina nýggja móttøkueind í Cosmic við øllum pakkagongdunum sum "henvisningskabelon". Eisini ber til at tryggja, at diagnosukotur verða ásettar við ávísing, so til ber at skráseta, nær ávísingin er send. Hvør pakki kann fáa sín egna leist at ávísa eftir – tvs., at t.d. kommunulæknin fær høvi at útfylla ávís lyklaorð, ið kunnu vera serstøk fyri hvønn einstakan pakka – hetta í samráð við serøkini og kommunulæknarnar. Eisini ber til at senda ávísingarnar víðari til viðkomandi serøki í Cosmic, tá ávísingarnar eru móttiknar í Krabbamóttøkuni.

Fyrimunurin við at hava pakkarnar sum “henvisningsskabelon” er, at so er ikki tørvur á einari læknaligari visitatión í Krabbamóttøkuni – pakkarnir hoyra longu til ávís serøki.

***Mælt verður til, at nýggja Krabba**útgreiningareindin **í Cosmic verður einasta inngongd í Cosmic til ávísingar við illgruna um krabbamein. Um ávísingarnar verða skipaðar eftir pakkagongdum, so verður lætt at senda ávísingarnar víðari til viðkomandi serøki ella eindir.***

Á rannsóknarferðini hjá bólkinum í Keypmannhavn varð viðmælt, at bert ein inngongd verður til krabbaávísingar, tí so er lættari at skráseta og monitorera, um tíðarfreistirnar verða hildnar.

Krabbaútgreiningareindin skal vera mannað hvønn gerandisdag og arbeiða eftir greiðum leiðreglum. Ávísingarnar, ið koma í krabbamóttøkuna skulu hvønn dag sendast víðari til viðkomandi serøki ella eind – ella verða kanningar bílagdar sum ásett í pakkagongdum eftir avtalu við serøkini og eindirnar av viðkomandi, sum ansar krabbamóttøkuni. Avgerandi er, at greiðar avtalur eru við øll viðkomandi serøki og eindir, so ávísingar, ið verða víðarisendar, verða viðgjørdar skjótt.

**“Forløbskoordinator” - sjúkrarøktarfrøðingur við samskiparaførleikum:** Ein sonevndur “forløbskoordinator” verður brúktur í donsku skipanini til at skipa fyri, at ávístir sjúklingar fáa tíðir til kanningar, fáa boð og verða hoyrdir, um trupulleikar eru. Samskiparin skal varða av krabbamóttøkuni og umsita hana í gerandisdegnum. Sostatt er ein tílíkur samskipari avgerandi at fáa skipanina at koyra smidliga.

Fyrimunurin er, at tað verður lættari hjá serlæknunum, tí teir tørva ikki at bíleggja kanningar ella halda skil á, at sjúklingarnir fáa nóg skjótar tíðir – tað verður luturin hjá samskiparanum at tryggja, at so verður. Avgerandi er tó, at tað verða gjørdar púra greiðar avtalur millum krabbamóttøkuna og serøkini/eindirnar, og at samskift verður áhaldandi eftir tørvi. Gongdarsamskiparar eru sjúkrarøktarfrøðingar við einari eftirútbúgving.

**Diagnostisk eind:** Ein diagnostisk eind verður brúkt í donsku pakkaskipanini at lofta teimum, ið ikki passa í eina pakkagongd, tí sjúkutekini eru ikki heilt greið – men illgruni er um krabbamein, t.d. orsakað av, at sjúklingurin ótilvitað er lætnaður. So ber til hjá kommunulæknunum at ávísa til diagnostiska pakkagongd, og sjúklingurin verður sæddur í nærmastu diagnostisku eind.

Diagnostisku eindirnar í Danmark eru mannaðar av serlæknum í ymiskum sergreinum – t.d. á Herlev, ið arbeiðsbólkurin vitjaði, var diagnostiska mannað av endokrinologum. Harafturat vóru sjúkrarøktarfrøðingar í føstum starvi í diagnostisku eindini.

***Arbeiðsbólkurin mælir til, at Krabba**útgreiningareindin **í Cosmic skal vera mannað hvønn gerandisdag av gongdarsamskipara, ið er sjúkrarøktarfrøðingur við eftirútbúgving.***

***Mælt verður til, at tríggir sjúkrarøktarfrøðingar verða útlærdar at vera gongdarsamskiparar.***

***Mælt verður til, at skipað verður ein diagnostisk eind á Medisinska Deplinum, ið skal virka allar gerandisdagar. Eindin skal mannast við trimum føstum sjúkrarøktarfrøðingum, ið eisini eru gongdarsamskiparar – og serlæknum og hjálparlæknum eftir tørvi.***

## Onnur serøki mugu eisini fáa eitt lyft

Tað er arbeiðsbólkinum greitt, at skal Sjúkrahúsverkið hava møguleika at liva upp til á leið somu ásetingar um bíðitíðir, sum í okkara grannalondum, so verður neyðugt at uppraðfesta fleiri sentral økir á sjúkrahúsunum, sum hava týðandi leiklut í útgreiningini.

*Patologi:*

Patologi er skipað undir Diagnostiska Deplinum á Landssjúkrahúsinum. Ein fastur serlækni í patologi er í starvi á Landssjúkrahúsinum eins og ein skrivari. Patologiin dúvar uppá bioanalytikarar frá rannsóknarstovuni at gera fyrireikandi arbeiði av vevnaði v.m. Seinastu tíðina er útgerðin innan patologi raðfest í rannsóknarstovuni, so høvi verður at gera fleiri kanningar í Føroyum enn áður. Enn verður tó nógv sent til Keypmannahavnar til kanningar, ið kann taka rættuliga langa tíð at fáa avgreitt. Patologiska deild á Ríkissjúkrahúsinum er ovbyrðað av egnum virksemi, men roynir at avgreiða føroysku royndirnar eftir førimuni.

Skal endamálið røkkast, at fáa avgreitt so nógv sum gjørligt í Føroyum, og harvið fáa t.d. skjót biopsisvar, verður neyðugt at gera nakrar raðfestingar aftrat, fyri at lyfta patologiska økið í Føroyum. Fyri at tryggja eina javna framleiðslu, verður neyðugt at søkja eftir í minsta lagi einum serlækna í patologi aftrat at vera á Landssjúkrahúsinum. Harafturat skulu tveir bioanalytikarar burturav arbeiða við patologi og tryggja, at tilfarið, ið verður handfarið, verður við so høgari dygd sum gjørligt. So verður eisini gjørligt at nýta tilfarið til fjargreining – tvs. umvegis telesamskifti. Tað er ikki møguligt í dag, tí verandi skipan við ikki serútbúnum føstum bioanalytikarum elvir til, at góðskan av klárgjørdum vevnaði til kanningar ikki er nógv støðug.

Eisini verður neyðugt at keypa nøkur tól aftrat, sum fara at gera tað møguligt at sleppa undan at senda ymiskt tilfar til Danmarkar til greiningar.



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

***Mælt verður til, at peningur verður játtaður til ein serlækna í patologi aftrat***

***Mælt verður eisini til, at raðfest verður, at tveir bioanalytikarar burturav fara at arbeiða innan patologi á Rannsóknarstovuni.***

***Og mælt verður til, at útgerðin, ið manglar, verður keypt, so møguligt verður at greina meira í Føroyum enn nú.***

*Endoskopi:*

Í Sjúkrahúsverkinum er møguleiki fyri at gera endoskopiir á øllum trimum sjúkrahúsunum. Arbeiðsbólkurin mælir til at útgreining við illgrunað um krabbamein sum høvuðsregla verður framd á Landssjúkrahúsinum. Krabbameinsútgreining verður definerað sum ein akut útgreining at hesar verða gjørdar har sum manning er til akuttar skopiir. Arbeiðsbólkurin mælir til at fleiri kontrol-skopiir kunnu liggja á SS og KS, so kapasiteturin verður gagnnýttur í øllum sjúkrahúsverkinum.

‘Endoskopi eindin á Landssjúkrahúsinum er skipað undir Skurðdeplinum. Verandi karmar eru frá 2008, og er ikki stórvegis broytt síðani tá – bæði viðvíkjandi hølum og útgerð. Læknahópurin, ið er tengdur at endoskopiini, eru parenkym skurðlæknar og serlæknar í gastroenterologi (ið hoyra til Medisinska Depil). Hesir læknar gera allar endoskopisku kanningarnar, ið verða framdar á Landssjúkrahúsinum. Fimm sjúkrarøktarfrøðingar eru harafturat í starvi í endoskopiini. Eingin skrivari er tengdur at eindini.

Virksemið í endoskopisku eindini er stórt og er trupult at nøkta tørvin verið verandi manning og kørmum. Nógvar kanningar eru kontrolkanningar – men talið av nýávísingum er bara vaksandi. Allar ávísingar til endoskopi fara sama stað – tvs., ávísingar orsakað av illgruna um møguligan krabba enda sama stað sum aðrar ávísingar, ið ikki eru tengdar at krabba. Ongar beinleiðis leiðreglur eru fyri visiatión, hvussu skjótt fólk ávíst við illgruna um krabba koma til.

Ein stór avbjóðing eru verandi karmar fyri at bæði økja um virksemið og gera verandi virksemi meira skynsamt og nútíðarhóskandi. T.d. eru vaskimaskinurnar til endoskopini púra ótíðarhóskandi. Harafturat er einki hóskandi høli hjá kannaðum sjúklingum at koma fyri seg, um tey hava fingið eitt sindur av doyvandi heilivági. Og tað eru bert tvey kanningarrúm – og tískil er trupult at økja um virksemið.



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

Vanligt er uttanlanda, at sjúkrarøktarfrøðingar verða upplærdar at gera bæði kolo- og gastroskopi. Serliga er talan um kontrolkanningar. Hetta er ikki komið í lag í Føroyum. Men verður sjúkrarøktarhópurin øktur til seks fólk, so verður gjørligt at upplæra 1-2 sjúkrarøktarfrøðingar at gera kanningar.

Verandi hópur av sjúkrarøktarfrøðingum hava nógv at gera við at bóka sjúklingar og taka móti boðum, ið tarnar teirra arbeiði. Tískil er eisini eitt stórt ynski at fáa ein skrivara tengdan at eindini.

Læknahópurin er viðbrekin, og hevði verið ynskiligt at havt ein yvirlækna burturav tengdan at eindini, ið kom aftrat verandi læknamanning. Eisini hevði verið gjørligt við betri kørmum, at havt útbúgvingarlæknar í eindini, ið vórðu upplærdir at gera endoskopi.

***Mælt verður til, at endoskopiska eindin fær betur karmar at virka undir fyri at tryggja, at sjúklingar ávístir við illgruna um krabbamein verða kannaðir sum ásett í pakkagongdunum. Endoskopi er heilt sentralt í útgreiningini av øllum við illgruna um krabbamein í sodningarleiðini.***

Best hevði verið, um ein heilt nýggj endoskopi eind varð gjørd við nýggjum hølum og útgerð – so til bar at vera í verandi kørmum og so flyta inn í tað nýggja, tá tað stendur klárt. Tað er greitt viðmæli frá medicotekniska ábyrgdaranum eisini. Ein nýggj endoskopi skal hava í minsta lagi trý kanningarrúm. Og eitt nýtt vaskirúm, ið er uppbýtt í eina skitna og reina sonu, við nýggjum vaskimaskinum og skápum til skop. Talið av skopum má hækkast fyri at gera fleiri kanningar. Og høvi má vera at leggja kannaðar sjúklingar eitt trygt stað at vera, tá teir skulu koma fyri seg.

***Mælt verður til, at sjúkrarøktarfrøðingahópurin skal økjast til seks og skulu tvær sjúkrarøktarfrøðingar upplærast at gera kanningar. Ein skrivari skal eisini verða settur í eindini, so tíðin hjá sjúkrarøktarfrøðingunum verður betur gagnnýtt.***

***Viðmælt verður, at ein fastur yvirlækni verður settur í eindina aftrat verandi manning.***

Ein vælvirkandi endoskopi eind verður heilt avgerandi fyri, at ein týðandi partur av krabbaávísingunum kunnu verða loftaðar innan ásettu tíðarmørkini í pakkagongdunum.

*Røntgen:*

Røntgendeildin er skipað undir Diagnostiska Deplinum. Røntgendeildin ger í krabbahøpi CT skanningar, MR skanningar og ultraljóð. Serliga er tørvur á CT skanningum í nógum pakkagongdum. Ein CT skannari er á Landssjúkrahúsinum, men ein nýggjur er ávegis, ið skal staðsetast í nýggjum

høli. Í framtíðini vera tískil tveir CT skannarar á Landssjúkrahúsinum,umframt ein CT skannari á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Arbeiðsbólkurin hevði á fundi við leiðsluna á røntgendeildini á máli, at tað hevði verið best, um atgongdin til tíðir til serliga CT skannaran var ómakaleyst hjá einum nýggjum gongdarsamskipara. Í Keypmannahavn er tað skipað soleiðis, at gongdarsamskipararin hevur høvi at bíleggja tíðir, ið eru ásettar í kalendaranum at vera brúktar til pakkagongdir. Hesar kunnu so standa tøkar til dagin fyri – og um tær tá ikki eru brúktar, so ber til at bóka aðrar sjúklingar á.

Sambært leiðsluni á røntgendeildini ber til at gera neyðugu raðfestingarnar, so tað fer at bera til at fáa skjóta CT tíðir til sjúklingar ávístir í pakkagongdum. Eisini verður gjørligt at gera tað sama til t.d. ultraljóð.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at í samstarvi við røntgendeildina verður skipað fyri, at 1-2 CT skanningartíðir hvønn dag verða raðfestar til pakkagongdir – og at hesar verða tøkar til annað virksemi, um tær ikki eru vorðnar bókaðar dagin fyri.

*Kommunulæknaskipanin:*

Kommunulæknaskipanin er í dag normerað til 34 kommunulæknastørv kring landið. Heilsutrygd umsitur kommunulæknaskipanina. Av teimum kommunulæknastørvunum eru uml. 25% mannaði við vikarum.

Arbeiðsbólkurin vitjaði kommunulækna Róa á Kósini í Gundadali. Tað kom fram, at í flestu førum kemur illgrunin um krabbamein, tá sjúklingar eru til viðtalu. Sostatt íkemur illgrunin sjáldan í telefonviðtalu áðrenn – ella tá ein sjúklingur biður um tíð til viðtalu. Sambært Róa á Kósini var eingin ivi um, at kommunulæknaskipanin ynskir, at vit í Føroyum fáa eina líknandi skipan, sum í Danmark. Eisini nevndi Rói, at dømi longu nú eru um, at Styrelsen for Patientsikkerhed brúka donsku ásetingarnar at meta um, hvussu kommunulæknarnir í Føroyum hava virkað ísv. t.d. klagumál. Tí var greiða viðmælið frá Róa, at ásetingarnar, ið verða í Føroyum, koma at vera so tætt við tær donsku sum gjørligt.

Rói á Kósini helt serliga, at tað var átrokandi at fáa serliga endoskopisku eindina at virka betur – hann nýtti tíð og orku til at fáa sjúklingar til, ið hann metti tørvaðu skjóta tíð. Hetta hevði verið loyst, um greiðar mannagongdir vóru orðaðar í einari pakkagongd.

Viðv. “actionkortum”, so er heilt greitt, at eitt tílíkt skjal má vera lætt og ómakaleyst hjá kommunulæknunum at nýta. Eisini fyri at tryggja, at vikarar t.d. kunnu brúka hetta uttan stórvegis upplæring.

***Tilgongdin at tillaga “actionkortini” til føroysk viðurskifti, skal eisini umfata neyvt samskifti við kommunulæknarnar. Atgongdin skal vera góð og tilfarið skal vera brúkaravinarligt.***



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo